# Bygging

Her er ein mynd av frásøgufrymlinum og greitt verður frá hugtøkunum hæddarpunkt, nú vendist ikki aftur og myndbering.

**Frásøgufrymil**
Frasøgufrymilin er ein frymil, sum vísir søgu- og spenningsgongdina í eini søgu (kveikjari, frágreiðing um søguna, dýping, nú vendst ikki aftur, hæddar-punkt, fáning). Summar søgur fylgja fullkomuliga frásøgufrymlinum, meðan aðrar víkja frá gongdini í frymlinum.

**Nú vendst ikki aftur**
Nú vendst ikki aftur er tað staðið í eini søgu, har einki verður aftur, sum tað var frammanundan. Hetta verður eisini kallað 1. skifti.




**Myndbering**
Myndbering er ein málslig mynd, sum merkir okkurt annað og meira enn tað, sum orðini beinleiðis siga.

**Hæddarpunkt**
Hæddarpunktið er tað staðið í søguni, har spenningurin er í hásæti. Hetta verður eisini kallað 2. skifti og er oftast nær endanum á søguni. Samansettir tekstir enda ofta júst í hæddarpunkt-inum, soleiðis at lesarin sjálvur má ímynda sær, hvussu søgan endar.

Nem í sætta síða 216, 219